# og alla hesa tíð...

sum fáir sangir eru tað, og tekstur og lag ganga hond í hond líka til Hákunardrongur tekur yvir hjá teimum smáu. Sjálvur spældi eg sangin fyri trý ára gomlu dóttrini, sum beinanvegin segði "Rura, rura barnið". Samanberingin kundi kanska borið boð um klassikarastatus!

Eisini er "Sum ein sól", ið eisini er ein heilsan til barnið, eitt fínt lag, hvørs huglag riggar væl til barnasinnið.

Somuleiðis er lagið "Fjakkarin" ein stuttlig roynd at skapa eitt væl svingandi lag við elementum úr nógvum tónleikasløgum, vælkoyrandi bassi og blásarum, sum næstan endurskapar fosturlandssangsjangruna. Teksturin fortelur um sangaran, ið hevur verið næstan allastaðni kring knøttin, men honum dámar best í Føroyum, tí har hitti hann gentuna eitt kvøld í dansinum. Jú, Eyðun dugir enn at trýsta á teir røttu knøttarnar sum romantikari. Og eingin hevur pástaðið, at vit búgva í Føroyum av praktiskum orsøkum.

"Skjótt framvið" er ein kensluborin ballada, har bæði lag og tekstur hava ta tyngd, sum skal til fyri at fáa ein góðan poppsang.

### Rein rødd

Umframt at syngja púra reint, sum er ein av avgjørdu styrkjunum hjá Eyðuni, er eisini vert at nevna, at hann heldur fast við sítt bygdar-/býarmál, uttan at leggja seg eftir at syngja eitt syntetiskt og skaput havnarmál, sum tíverri tykist at vinda upp á seg í føroyskum sangi. Burtursæð frá eini tveimum "ei'um", so eru tvíljóðini úr Norðoyggjum enn tey somu, og hetta ger ikki minni trúvirði minni.

Harafturat ger Eyðun ikki tey somu málsligu mistøkini á hesari fløguni, sum hann onkuntíð hevur gjørt áður, tá hann m.a. hevur sungið "nú er grúgvin køld", "kanst tú siga forvæl", "bæði synir og døtrar" ella tautologiina "við tær eg fylgi við". Hesar orðingar hava mangan undrað meg, tí umframt at vera tikin úr leikum sum lagsmiður, so er Eyðun eisini ein sera dugnaligur teksthøvundur, ið meistrar málið sera væl og er sera tilvitaður, hvat tónleikaslag hann skrivar til. Umframt hetta hevur hann seinastu fjórðingsøldina verið roknaður sum ein tann besti mannligi sangarin í Føroyum og hevur tí rokkið hvørjum útvarpslurti í landinum, og hetta gevur eisini eina serliga ábyrgd.

Fløguhúsin er snøggur og hóskar væl til heildina, og hesum er multikunstnarin Høgni Egholm Magnussen bara komin væl frá. Tó hevði tað ikki gjørt fløguna verri sum prentlut, um ein rættlesari var sloppin framat í støðum at lúka tað ringasta burtur.

Um Eyðun Nolsøe er komin víðari, sum onkur hevur eftirlýst, veldst um, hvat tú leggur í tiltakið at koma víðari, og um tað er eitt endamál í sær sjálvum. Í øllum førum ber til at staðfesta, at Eyðun Nolsøe er komin sterkt afturíaftur.

Røddirnar eru so nógvar, men tann hjá Eyðuni man enn vera ein tann frægasta, ið er at hoyra á føroyska tónleikapallinum í dag.

Kim Simonsen

filmar

# 300% - Filmurin 300 rokkar for svakt

**Filmurin 300 er eitt tetestoronkent urbrøl og tónleikurin er vælvaldur. Meginparturin av filminum er ein stór og ógvuslig bardagasena frá bronsualdrinum, ja, ongantíð sá eitt slátur so gott út á filmi fyrr sum nú**



## Ummæli



**Kim Simonsen**
kimsimonsen@hotmail.com

300 er blóðugta søgan hjá Frank Miller um kenda søguliga slagið við Thermopylæ, har kongurin Leonidas og 300 djarvir spartanar bardust móti persarakonginum Xerxes. Her stóðu spratanarar framman fyri einari ómøguligari uppgávu at berjast við eina millión hermenn, tí fyri teir var einki við at yvirgeva seg, bert bardagin um deyða og æru.

Vit eru í árinum 480 f. kr., har dekadenti Kongurin Xerxes, sum heldur seg vera ein gud, hevur vunnið á øllum Asia, og nú skuldi hann vinna restina av heiminum fram til Atlantshavið. Iran hevur longu funnist at hesari søguligu framsetingini og kalla hann fyri reina rasismu.

Grikkaland var tá býtt í minni býarstatir, sum høvdu býir sum sentur. Í Sparta búðu teir fremstu hermennirnir, ið longu frá barnsbeini vóru vandir við at berjast – hesir gjørdu einki annað.

Sparta var eitt samfelag, har tað ikki var pláss fyri teim veiku, tí spartanarar sóu seg sjálvar sum eitt nærum fasistiskt harrafólk, ið heldur vildu liggja eftir á, enn at gerast partar av eini samgongu.

Kongurin Leonidas tekur lívið av boðberunum, ið koma fyri at biða hann yvirgeva seg. Politikarnir vita ikki hvat teir skulu gera, og teir elstu heita á Oraklið í Delphi.

### Thermopylæ

Slagið við Thermopyle vardi í fýra dagar og kostaði óteljandi persarum lívið. Tað var her, at søgan og mytan sigur, at grikkar komu at steðga persarakonginum, og var hetta ikki hent, so meta nógv at t.d. fólkaræði helst ongantíð hevði sæð dagsins ljós.

Sum reinur estetikkur er hesin filmurin heilt ótrúliga nær við teknirøðina hjá Frank Miller, ið gav okkum kultrøðina og filmin "Sin City!.

### Ein teknirøð

Filmurin "300" er gjørdur eftir einum forleggi hjá kenda teknaranum Frank Miller. Hann sá filmin "Teir 300 spartanarnir" sum barn og fór sum vaksin undir hetta megnarverk.

Tað klæðir filmin, at tey, sum leika, eru so ókend. Tó er okkurt merkiligt homoerotiskt við filminum og øllum hesum hálvnaknu vøddamonnum.

Samanumtikið er 300 verður at síggja. Øll tey, sum elskaðu Troy, Braveheart og Gladiator, fara at elska hendan filmin, ja, kanska enn meiri enn hesar. Hetta er stórsligið undirhald.

★★★★☆☆

### Fakta

**300**

Leikandi

Kong Leonidas: Gerard Butler
Dronning Gorgo: Lena Headey
Dilios: David Wenham
Leikstjóri: Zack Snyder
1 tíma og 57 minuttir
Framførdur í Havnar Bio frá 16. mai
Loyvdur fyri øll yvir 15 ár

**Wallander** er ein røð av krimifimum, ið byggja á søgur eftir kenda Henrik Mankell. Hesir filmar hava eitt budgett uppá 190 milliónir krónir. Í partinum Containeren finna tey eina bingju fulla av deyðum fólkum. Bert eitt barn er á lívi. Hetta er hópdráp á stakkals ólóglig flýggjandi fólk. Wallander er nógv betur gjørdir krimifilmar enn vanligt er. 89 minuttir.
**4 stjørnur av 6**

**Snow Cake e**r ein hugtakandi søga um kærleika og eitt løgið forhold millum ein mann, sum krógvar seg frá síni fortíð, eina autistiska mammu og eina aðra meiri litinskapiliga kvinnu. Sigourney Weaver leikar væl, men onkunsvegna er filmurin ov stillur og løgin.
**2 stjørnur av 6**

**Lykkens Musikant** er er ein endurútgivin gamal danskur klassikari um eina eldri damu, sum letur nógvar ungar tónleikarar búgva ókeypis, bert um tey duga at spæla okkurt ljóðføri. Hetta er klassiska søgan um list mótvegis fornuft, bohemin mótvegis vinnulívinum. Sjálvt um filmurin er fittur, so er hann ótrúliga gamaldags og naivur.
**2 stjørnur av 6**




**Babel** er hin mest rósti filmurin higartil í 2007, og hann hevur fingið hópin av Oscarvirðislønum og virðislønina í 2006 í Cannes fyri bestu leikstjórn.

Ein heitur bussur í Marokko við móðum heitum og sløvum amerikanskum ferðafólkum. Við eitt verður ein kvinna skotin inn gjøgnum vindeygað. Í støðum er filmurin vakur og minnir okkum um, at vit liva í einum heimi, har samskifti og tað, at fólk veruliga skilja hvørt annað, er horvið. Filmurin fer beint niður í okkara tíðar andadrátt og tekur globalu vandamálini, órættin og hvussu útsett og sart vit øll eru í veruleikanum. Filmurin er politiskur, men mest av øllum er hann poetiskur, stillur og vakur.
**5 stjørnur av 6**

**Feast og The Goat** er um seks menn, ið ofraðu sítt lív fyri at at sleppa av við ónda einaræðisleiðaran í Dominikanska Lýveldinum. 35 ár seinni kemur Urania Cabral (Isabella Rosselini) aftur til Santo Domingo at tosa við pápan, ið arbeiddi fyri einaræðisleiðaran. Her eru loyndarmál, órættur og samansvørjingar. Syrgiligt at síggja Isabellu leika í einum so vánaligum filmi. Sjálvt um søgan byggir á skaldsøguna "Bukkens Fest'" eftir kenda Mario Llosa Vargas. Filmurin er melodramatiskur og patetiskur.
**2 stjørnur av 6**